# Blaðfólk

Á høvuðsredaktión okkara á Argjum er eitt spennandi, avbjóðandi og fjøllbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini, men møguleiki er tó eisini fyri uppgávum kring landið, har vit hava lokalredaktiónir í Klaksvík, Sandavági, Sandvík og við Saltangará.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum 1. februar komandi, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Vit rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært sáttmála millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller á telefon 341 800. Ella á teldupostadressuni, jan@sosialurin.fo.

Seinasta freist at søkja starvið er mánadagin, 19. januar, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
100 Tórshavn

**Sosialurin**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið.
Á Sosialinum starvast í dag umleið 30 fólk.

# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

**Sosialurin**
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3282, Sp/f Búhús, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:**
Kristianna Sofía Michelsen, Garðstún 1, 160 Argir (formaður), Kristian Mikkjal Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn og Ebbe Pauli Michelsen, Garðstún 1, 160 Argir.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:**
Kristian Mikkjal Michelsen, Smærugøta 15, 100 Tórshavn.

Felagið er tann 05.12.2004, farið í likvidatión við Alfred Petersen, advokati, Bøgøta 5, Box 164, 110 Tórshavn sum likvidator.

*Skráseting Føroya tann 7. januar 2004.*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1008, P/F Vestlax, 350 Vestmanna.

**Viðtøkur broyttar:**
25.09.2003.
**Nýggj Hjánøvn:** P/F Salmex (P/F Vestlax), P/F Laksafóður (P/F Vestlax) og P/F Bláfosslaks (P/F Vestlax)

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. Sp/f 2111, Sp/f Laksafóður, P/F 2593, P/F Bláfosslaks og P/F 2594, P/F Salmex sum samstundis verða strikað.

*Skráseting Føroya tann 15. desember 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 278, P/F Vatnsoyrar Snikkaravirki, 385 Vatnsoyar.

**Viðtøkur broyttar:**
09.12.2003
Lækkan av P/F-peningi við kr. 540.000,00 til kr. 460.000,00,viðtikið 24.05.2003 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 40.000,00 til kr. 500.000,00.
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 40.000,00 við grunshækking.

*Skráseting Føroya tann 15. desember 2003*

*Kristin Balle*

---

**www.sosialurin.fo**

KIRKJUBØAR KOMMUNA

# Kunngerð

**Almennir fundir hjá Kirkjubøar kommunu í 2004 eru hesar hósdagar:**

| | |
|---|---|
| 29. januar | 26. august. |
| 26. februar | 23. september |
| 25. mars | 28. oktober |
| 29. apríl | 25. november |
| 27. mai | 09. desember |
| 24. juni | |

Allir fundirnir byrja kl. 16.30 í Sólarmagn. Møguligar broytingar og eykafundir verða lýstir í svørtutalvunum í Kirkjubø og á Velbastað.

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdarráðsfundi, skulu verða kommununi í hendi 7 dagar áðrenn fundin.

**Frá 2. januar í 2004 verður kommunuskrivstovan opin hesar týsdagar frá kl. 13.00-16.00.**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 27. jan. | 27. apríl | 07. sept. | 30. nov. |
| 24. febr. | 25. mai | 28. sept. | 14. des. |
| 30. mars | 29. juni | 26. okt. | |

Ella eftir nærri avtalu.

**Kirkjubøar kommuna**

# Vágs skúli Lærarastarv

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 26 tímar/viku.

Starvið er tíðaravmarkað frá 26. januar til 30. januar 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran tlf. 373192.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða Skúlastýrinum í hendi seinast fríggjadagin 16. januar 2004.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
v/ Eilen D. Simonsen
925 Nes - Vágur

**Plast-húsaklædningur**
**Massiv brettir**



**Viðlíkahaldsfríur**

**Rímuligir prísir**

**Á goymslu hjá:**
Sosialurin 311820

**pf Klement Petersen**
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



FØROYA LANDSSTÝRI

**Heimarøktin**

# 3 føst størv til nýggja stuðulstoymið hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri vaksin í Suðurstreymoy

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Málbólkurin er heimabúgvandi fólk millum 18-66 ár, ið hava munandi skerdan kropsligan og sálarliga virkisførleika, orsaka av sinnisligum brekum, heilaskaða, epilepsi, rørslutarni, tvørrandi ella vánaligum tosingarlagi, eru blind, sjónveik, deyv ella tunghoyrd.

Ætlanin við nýggja stuðulstoyminum, er at byggja upp ein tvørfakligan starvsfólkabólk, við pedagogum, ergoterapeutum, fysioterapeutum, sjúkrarøktarfrøðingum, sosialráðgevum, sosial- og heilsuatstøðarum o.ø.

Endamálið við hjálparveitingunum er sum heild at fyribyrgja, at hin einstaki verður verri fyri. Endamálið er eisini, at tann einstaki skal hava møguleikar at fáa eitt betri lív.

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaskin ynskir at stuðla, ið m.a.:**
- Kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamallir í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intutión
- Vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellur
- Eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- Hava eina positiva menniskjafatan
- Hava hug og hegni til at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi
- Eru opin, virkisfýsnir og menningarkunnaðir
- Kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett 01.03. 2004 ella skjótast aftaná.

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin kann bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum at menna seg bæði persónleiga og fakliga
- Ein virkin tvørfakligur starvsfólkahópur
- Samávirkan á gerandisuppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um 3 føst størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði.

Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um størvini eru at fáa hjá sosialráðgeva Odu M. Johannsdóttir, pedagogi Fíu Jespersen og leiðaranum Regin Johansen, tlf. 354020.

Umsóknarfreistin er sett til fríggjadagin 23.01.2004, og umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin**
Att: Regin Johansen
Niels Finsensgøta 28 - 2. hædd
100 Tórshavn

**VARPIÐ**
**Skráir og ummælir**
**Hvønn fríggjadag**
**20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna**

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá TV • Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ DK 4 • TV 1000 • TV3 dk • Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel Euro Sport • MTV • National Geographic • TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

# FRÁ KLIVANUM



Søkt verður eftir fyrikomandi fólki við starvsroyndum til handilin

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Klivin**
Postboks 1232
110 Tórshavn
tel 318110

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3068, Sp/f Eysturoyar Teoriskúli, 530 Fuglafjørður.

**Viðtøkur broyttar:**
18.08.2003.
**Nýggjur Heimstaður:**
Runavíkar Kommuna.
**Adressa:** Box 158, 620 Runavík.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Stanley Arndal Olsen, 240 Skopun (formaður).
**Innkomin sum formaður:**
Niels Ole Lykke, Húsagøta, 410 Kollafjørður.
**Innkomin í nevndina:** Jari Lykke, Húsagøta, 410 Kollafjørður.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Johan Beder, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.
**Innkomin sum stjóri:** Hugo Dan Kristiansen, 645 Æðuvík.
**Grannskoðari:**
**Farin frá sum grannskoðari:** Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, Gerðisvegur, 600 Saltangará. Innkomin sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 17. desember 2003*

*Kristin Balle*

---

# Sethús í Hirtshals til sølu

Húsini eru nýrenoverað.

Við í keypinum fylgja:
- Voss innbygningsovnur
- Keramikk kókiplátur
- Stál eymhetta
- Nordcold køli/fyrsti skáp
- Uppvaskimaskina
- Vaskimaskina
- Turkitrumla

El-innstallatiónin er nýggj. Saniteti er nýtt. Stórur nýggjur køkur og stórt nýtt baðiverilsi.

Stødd: uml. 200 fermetrar v/útistovu, garasju og verkstaðsrúmi.

Søluprísur: 1.155.000 kr.

Fígging: Brutto/mdr. 7.469,-
Netto/mdr. 5.600.-
Útgjald 80.000,-

**Tlf. 0045 22475235 ella 0045 96560557**

# Lastbilur til sølu

Volvo FL 14 v/ kassa bíliga til sølu.

**Tlf. 228063**